**(Uppskot til)**

# Kunngerð
# um
# luftdálking frá skipum

Við heimild í § 14, stk. 4, § 15, § 20, § 35, § 37 og § 45 í lóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2013, verður ásett:

*Fevnd*

**§ 1.** Kunngerðin ásetur markvirði fyri svávul í brenniolju, sum skip og havstøðir brúka og reglur um brenning av burturkasti umborð.
*Stk. 2.* Kunngerðin er galdandi fyri føroysk skip á sjóumveldinum og í altjóða sjógvi, útlendsk skip á sjóumveldinum, havstøðir á føroyska landgrunninum og veitarar í Føroyum av brenniolju til skip.

**§ 2.** Í hesi kunngerð skilst við:
1) *Annex VI:* Annex VI til MARPOL-sáttmálan 1973, sum broyttur við protokollum frá 1978 og 1997 um fyribyrging av luftdálking frá skipum.
2) *Brenniolja:* brenni, óansæð slag, sum er ætlað at verða brent ella brúkt umborð á skipi ella havstøð til framdrátt ella annað endamál.
3) *Øki við herdum útlátskrøvum:* Eystrasalt, Norðsjógvurin og Norðuramerikansku økini, sum lýst í reglu 14.3 í Annex VI.
4) *IMO:* International Maritime Organization.
5) *Útlátsminkandi skipanir:* Innrættingar, tilfar, útgerð, útbúnaður, mannagongdir, brennievni ella íblandingarevni, sum verða brúkt til at minka um útlátið av $SO_2$.

**§ 3.** Reglurnar í hesi kunngerð galda ikki í førum, tá útlátið er neyðugt fyri at bjarga mannalívum á sjónum ella fyri trygd skipsins ella í førum, har skaði á skip ella útgerð eru atvoldin til útlátið og øll hóskilig tiltøk eru sett í verk at fyribyrgja og minka um útlátið.

**§ 4.** Reglurnarí hesi kunngerð galda heldur ikki í førum, tá talan er um
1) brenniolju, sum myndugleikin hevur loyvt í sambandi við gransking og royndir at skerja útlát,
2) útlát í sambandi við leiting og framleiðslu av kolvetnum og øðrum steinrunnum evnum á havbotninum ella úr undirgrundini og atknýttum virksemi.

*Brenniolja til skip og havstøðir*

**§ 5.** Innihaldið av svávuli í brenniolju, sum verður brúkt á skipum og havstøðum, skal ikki vera oman fyri hesi markvirði:
1) 3,50 vekt % til og við 31. desember 2019 og
2) 0,50 vekt % frá og við 1. januar 2020.
*Stk. 2.* Á økjum við herdum útlátskrøvum skal innihaldið av svávuli í brenniolju, sum verður brúkt á skipum og havstøðum, ikki vera oman fyri 0,10 vekt %.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi, tá útlátsminkandi skipanir og hættir sambært § 8 verða brúktir.

**§ 6.** Frá 1. juli 2018 skal innihaldið av svávuli, sum verður brúkt umborð á skipum og havstøðum, sum liggja við bryggju í føroyskari havn ella fyri akker nærri enn tveir fjórðingar úr landi, vera í mesta lagi 0,10 vekt %.
*Stk.* 2. Skip skulu skjótast gjørligt, aftan á, at tey hava lagt at bryggju ella kastað akker, og so stutt sum gjørligt áðrenn fráferð, brúka brenniolju, sum lúka krøvini í stk. 1.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri skip í fastari rutu, sum liggja við bryggju styttri enn tveir tímar.

*Skjalprógv fyri svávulinnihaldi*

**§ 7.** Veitari av brenniolju skal í fylgiseðli skjalfesta, at innihaldið av svávuli í brennioljuni lýkur krøvini í § 5, stk. 1 og 2. Við fylgiseðlinum skal fylgja ein umboðandi roynd av brennioljuni, sum er váttað av bæði veitara og móttakara. Oljuroyndin skal takast sambært leiðreglum hjá IMO.

*Stk. 2.* Fylgiseðilin skal goymast umborð í trý ár aftan á bunkring, og vísast fram eftir umbøn frá eftirlitsmyndugleikanum. Oljuroyndin skal goymast umborð í 12 mánaðirnar, ella til oljan er brúkt.

*Útlátsminkandi skipanir*

**§ 8.** Umhvørvisstovan kann loyva, at útlátsminkandi skipanir verða brúktar í staðin fyri at lúka treytirnar í § 5, stk. 1 og 2. Hesar skipanir skulu tryggja, at útlátið av $SO_2$ er ájavnt við ella lægri enn tað, sum loyvda brennioljan sambært § 5 hevði givið.

*Stk. 2.* Skip kunnu fáa tíðaravmarkað undantaksloyvi frá ásetingunum í §§ 5-6 í hesi kunngerð, í sambandi við menning av tøkni til at minka um útlát og yvirvøku av hesum.

*Brenning umborð*

**§ 11.** Á sjóumveldinum er bannað skipum og havstøðum at brenna burturkast frá vanliga rakstrinum umborð.

*Stk. 2.* Uttan fyri sjóumveldið er einans loyvt at brenna burturkast, leivdir og evju frá olju og kloakkspillivatni frá vanliga rakstrinum í hartil góðkendum brenniovni ella ketli.

*Stk. 3.* Bannað er at brenna

1) leivdir av farmi, sum eru fevndar av Annex I, II og III í MARPOL og pakkitilfar, sum er dálkað við hesum evnum,
2) polychlorerað biphenyl (PCB),
3) burturkast, fevnt av Annex V til MARPOL, sum inniheldur ikki ótýðandi nøgdir av tungmetalum,
4) reinsað olju, sum inniheldur halogen, og
5) polyvinylchlorid (PVC), tó undantikið brenning í IMO-sniðgóðkendum brenniovni.

*Eftirlit og kæra*

**§ 12.** Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi kunngerð verða hildnar.

**§ 13.** Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni sambært hesi kunngerð kunnu kærast til landsstýrismannin. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er fráboðað.

*Revsing*

**§ 14.** Við bót verður tann revsaður, ið

1) brúkar brenniolju við ov høgum svávulinnihaldi sambært §§ 5 og 6 uttan útlátsminkandi skipan sambært § 8, stk.1 ella undantaksloyvi sambært § 8, stk. 2,
2) ikki skjalfestir svávulinnihaldið ella letur oljuroynd í sambandi við oljuveiting sambært § 7,
3) brúkar útlátsminkandi skipanir, sum ikki lúka krøvini í § 8, stk. 1,
4) brýtur ásetingar um brenning sambært § 11.

*Stk. 2.* Er brotið framt av partafelagi, smápartafelagi, lutafelagi ella tílíkum, kann bótin verða kravd av felagnum sjálvum.

*Stk. 3.* Er brotið framt av landinum, einari kommunu, einum kommunalum felagsskapi ella einari havn, kann landið, kommunan, kommunali felagsskapurin ella havnin, verða áløgd bót.

*Gildiskoma*

**§ 15.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.